# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vælferðin kostar

Løgmaður er ikki serstakliga ítøkiligur, tá hann umrøður almannamálini síni heild. Han vísir bert til, at okkara samfelag skal lofta teimum, sum hava tørv á hjálp og tryggja øllum javnbjóðis møguleikar. Møguleikar at skapa sær eina gevandi og innihaldsríka tilveru. Møguleikar at velja lívsleið, sama um tú ert barn av stjóra ella verkafólki. Her kunnu vit øll uttan víðari vera samd við løgmann og hansara ABC samgongu. Men so kemur fyrivarnið, og løgmaður heldu fram við at siga, at eitt vælferðarsamfelag krevur støðuga eftirmeting og endurmenning, og so vísir hann til, at vit brúka ov nógvan pening á almennu fíggjarætlanunum.

Vælferðin kostar altso borgarans pengar, men vissar løgmaur okkum: vit fara undir ongum umstøðum at seta vælferðina til viks. Trivnaðurin hjá borgarunum er aðalmálið í politikkinum hjá samgonguni. Men vit vilja tryggja, at vit fáa mest møguligt burtur úr hvørjari skattakrónu. Hetta er tann klassiska tvístøðan í vælferðarsamfelagnum, sum flestu framkomnu norðurlond kenna so væl. Vit hava tíbetur valt vælferðina, men vit gerast færri og færri til at fíggja hesa vælferð, og við borgarligum meirilutum er hugurin at fíggja vælferðina við øktum skattakrónum støðugt minkandi.

Hetta man vera ein orsøkin til, at løgmaður hóast nógv og føgur orð er so fáorðaður um størsta og tyngsta vælferðarøkið, nevniliga pensjónmálið. Tá Føroyar langt um leingi í 1959 fingu eina sømiliga almannaskipan við fólkapensjónini og við øllum teimum samfelagsbroytingum, sum byrjaðu umleið 1960, gjørdist land okkara so við og við til eitt klassiskt norðurlendskt vælferðarsamfelag. Norðurlendski vælferðarleisturin er fyrimynd hjá nógvum av heimsins londum. Tað eru tí allar orsøkir til at fegnast um vælferðarsamfelagið, og vit eiga sjalvsagt at fegnast um, at ein samgonga sum ABC 2 við einum sterkum borgarligum meiriluta hóast alt váttar, at øll gera manngarð um vælferðarasamfelagið.

Skulu tey føgru orð um vælferðarsamfelagið, sum støðugt ljóða frá tingsins røðarpalli, verða tikin fyri fult, so mugu landsins kosnu kvinnur og menn nú vísa, at tey taka penjónsmálið í tí álvara, sum hetta mál hevur uppiborið. Vit fáa at vita, at ein pensjónsreformur er á veg, og tað skilst, at innihaldið verður helst hitt sama, sum ein embætismannabólkur hevur mælt til. Hóast ymisk lýti og ósemju um pensjónsaldur er hetta ivaleyst eitt nýtiligt støði undir einum framtíðarrættaðum penjónspolitikki. Men hetta loysir ikki tann akutta tørvin á ábótum á støðuna hjá tí vanliga føroyska fólkapensjonistinum. Tey, sum bert hava fólkapensjón og samhaldsfasta eru sera illa fyri, og tað er í grundini ein gáta, hvussu hesi fólk klára gerandisdagin. ABC 2 ætlar at mótrokna allar inntøkur í fólkapensjónini og spara landskassanum hesa útreiðslu. Hetta merkir, at tey, sum hava eina pensjón frá pensjónskassa missa grundupphæddina. Hetta kemur sjalvsagt illa við hjá mongum, men hetta kundi kanska verðið góðtikið, um sparingin kom vanligu fólkapensjonisunum til góðar so ella so - eitt nú við at hækka Samhaldsfasta. Men hetta er ikki ætlanin, og tað er bæði synd og skomm og tekur líkasum glansin av føgru orðum løgmans um vælferðarsamfelagið.

**Sosialurin**

## Fleiri kommunulæknar – sjálvsagt!

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Einans 18 av 32 kommunulæknastørvum eru sett. Kommunulæknamiðalaldurin er 59 ár. Vit eiga 80 serlæknar uttanlands. Løgmaður sigur í løgmansrøðuni at: ”vit skulu halda áfram at útbúgva kommunulæknar í Føroyum”.

Vit fóru undir at útbúgva kommunulæknar í Føroyum fyri nøkrum árum síðani og at ætlanin tá, var at útbúgva tveir kommunulæknar árliga. Annar skuldi byrja í mars og hin september. Eingin er byrjaður síðani mars 2008 – hóast tríggir eru, sum sera fegnir vilja byrja beinanvegin og læknar eru, sum fegnir vilja hava teir í læru. Sonevndir tutorlæknar – also meiri royndir læknar.

**Felags útbúgvingarkonto til allar læknar**

Havi skilt, at orsøkin til at hesi ikki sleppa at byrja beinanvegin er, at kontoin sum skal rinda lesandi kommunulæknar verður rinda av einari útbúgvingarkonto undir landssjúkrahúsinum. Sama konto sum skal fíggja lønina hjá turnuslæknum, sum eru hjá kommunulækna umframt tey obligatorisku skeiðini hjá bæði turnuslæknum og læknum í kommunulæknaútbúgving. Peningurin er ikki tøkur, og tí er eingin byrjaður kommunulæknaútbúgvingina síðani mars 2008 sum skilst.

**Vikararnir nógv dýrari**

Vikararnir eru meir enn dupult so dýrir sum lækni, sum er í holt kommunulæknaútbúgvingina Eyðsæð er, at peningaliga loysir tað seg nógv betri at útbúgva kommunulæknar. Flestu vikarar eru uttan iva fínasta slag. Men flestøll ynskja, at tað er sami lækni vit koma til, tá okkum tørvar læknahjálp, heldur enn eitt nýtt andlit hvørja ferð.

Nú fari eg ikki at klandra løgmann fyri hetta, men - at siga siga at vit halda áfram at útbúgva kommunulæknar – tað er ikki veruleikin sæð úr mínum sjónarhorni!

**Hvør skal rinda?**

Áttu vit ikki at flutt rindanina fyri tey sum spesialisera seg í almennum medisini ella læra til kommunulæknar burtur frá einari konto sum er felags konto og heimahoyrandi á landssjúkrahúsinum? Og er tað ikki rímiligt, at garvaðu kommunulæknarnir, sum hava læknar í læru á seinasta útbúgvingarári ella í fasu 3 rinda ein part av lønini hjá nærumútbúna kommunulæknanum? Tað gera teir aðrastaðni og tað tykist púra rímiligt eftir mínum tykki.

## Eivindur lektari ridlar yrkisliga!?

**EYÐUN Á BORG**
málargari



MÁLFRØÐIN ÚR BOSINUM: Endiliga kom ein málfrøðingur úr bosinum / út undan væðingini. Eg havi saknað teir; veit ikki rættiliga, hvar summir teirra eru staddir í málrøktarstrevinum (ikki málrøktsstrevinum)!?

Haldi meg annars hóma ein farra av ”eg veit, hvat veitst tú?”-hugburði í spurningi lektarans.

Spell, sjálvt um eg kann vænta slíkt, tí eg brúki sjálvur eitt sindur av speisemi í míni málrøktarskriving.

RIDLANDI GRUNDVØLLUR: Mín málgrundvøllur ridlar so ikki! Hví er tín yrkisgrundvøllur farin at ridla? Fái hálvavegna illgruna um, at tú hallar til at hava samhuga við ”m.d.-bólkinum” ella ”foreiningini”!?

Man eg duga at hjálpa tær? Hví fegnast tit ikki um tað, sum grein mín snúði seg um, t.v.s. TJALD, ikki TELT? Hitt við VÍK er uttanumtos.

VÍK: Eg skrivaði: Vík eitur víkar í hvørsfalli eintali. Soleiðis eru málreglurnar. Tað eitur víkarbyrgisfólk og Hoyvíkar kirkja. Sum hoyvíkingur, partivíst, (takk fyri ættarstevnuna, hoyvíkingar!) og føroysklærari veit eg sjálvandi eisini, at orðabókin góðtekur orðið, Hoyvíksfles, sjálvt um vík ikki eitur víks men víkar í hvørsfalli eintali.

SÁLARBÓTARÁ: Fær nakar annars ilt av, at vit siga Sálarbótará, sum eisini er rætt eftir málløruni? Skulu vit ikki sleppa at siga tað?

HEYSTARDAGUR: Mætir málmenn yrkja um heystardag, sjálvt um heyst eitur heysts í hvørsfalli eintali. Ókey! Mykinesfólk búgva tó í Mykinesi, ikki mykinesarfólk!

HØVDARHAGI: Skopuningar siga Høvdarhagi um hagan norðuri við Høvdan, sjálvt um tað eftir mállæruni skuldi verið Høvdahagi. Tað er eisini í fínasta lagi.

MÁLFRØÐIHEITINI: Vilt tú hava málfrøðiheitini á hesum málfyribrigdum, so haldi eg, tað man vera betri, at tú tosar við onkran málprofessara.

MÁLRØKTARBÁTURIN: Eru vit málvinir annars ikki allir í sama málrøktarbáti? Er áralagið ikki nóg gott? Ger danska gjálvið framvegis ov nógv um seg?

Skulu vit málvinir ikki heldur samstarva og royna at basa málspillum, t.d. hesum, sum eg havi hoyrt og sæð í vørpum og bløðum í seinastuni?:

útgýtilsi, vindrætningur, tí bestu tíðina, eg sá allir bátarnir, gøgl og geil, kvart í / yvir o.s.fr., o.s.fr.

*Við blíðari málfrøikvøðu*

**Á Borg á Argjum 12. hundadag 2009**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.